# Hótti við at drepa

**Føroya rættur dømdi mikudagin í seinastu viku ein mann til psykiatriska viðgerð á sálarsjúkrahúsi í fimm ár fyri at hava hótt starvsfólk á Psykatriska Deplinum á Landssjúkrahúsinum við lívinum**

Randi Jacobsen

Frá oktober 2007 til seinast í 2009 hótti ein maður fleiri ferðir bæði læknar og pleygarar á Pykiatriska Deplinum við lívinum.

Hetta verður hann ikki revsaður fyri, tí hann var sálarsjúkur, tá ið hann setti fram hóttanirnar.

Í viðmerkingunum til dómin, sum varð feldur mikudagin seinastu viku í Føroya rætti, varð sagt, at maðurin skal í psykiatriska viðgerð í fimm ár fyri at forða, at hetta endurtekur seg. Hann skal undir útskriving vera undir eftirliti hjá Kriminalforsorgini, sum saman við yvirlæknanum fær heimild til at leggja mannin inn aftur. Møguliga skal maðurin í avvenjing fyri rúsdrekkatrupulleikar.

### Fleiri hóttanir

Maðurin varð dømdur fyri fleiri ferðir at hava hótt starvsfólkini í telefon, í brævi og meyli. Við ein pleygara segði hann, at hann ætlaði at drepa hann, og hann segði seg vita, at pleygarin hevði børn, og var tað tað, sum skuldi til fyri at fáa onkran at lurta eftir sær. Við ein annan pleygara segði hann, at um hesin ikki gjørdi arbeiði sítt til lítar, fór hann at drepa pleygaran. Tveir aðrar pleygarar hevði hann eisini hótt við at drepa.

Við onnur starvsfólk hevði hann sagt, at blóð skuldi flóta, og at onkur skuldi doyggja. Tríggir sjúkrarøktarfrøðingar fingu at vita, at hann visti, hvar tær búðu, at hann fór at drepa tær og skera tær á háls. Ein skrivari fekk boðini, at hann fór at stinga eyguni á henni út, og ein annar, at hon stóð ovarliga á deyðslistanum.

Maðurin varð fyri sjey ár síðan eisini dømdur í sálarliga viðgerð. Ta ferðina var hetta fyri harðskap.



*Tey gleða seg í berginum til klokkan ellivu jólaaftan at fáa vitjan av løgmanni og kanska borgarstjóranum í Havn eisini*
Mynd: Jens Kristian Van

# Løgmaður og borgarstjóri bodnir í herbergið

**Jólaaftan verður borðhald fyrrapartin, og um kvøldið verður jóladøgurði bæði fyri búfólk og fólk av gøtuni**

Randi Jacobsen

Í Herbergi Frelsunarhersins eru tey við at fyrireika seg til jóla.

Tey hava verið úti og keypt jólagávur, og innbjóðing er send bæði Kaj Leo Johannsen, løgmanni og Heðini Mortensen, borgarstjóra í Havn.

- Løgmaður kemur í hvussu er, tí tað hevur hann sagt, sigur Elisabeth Joensen, dagligur leiðari í herberginum.

Teir eru bodnir til morgunmatarborið klokkan ellivu, tá ið borðreitt verður við smurdum breyði og køkum.

Klokkan 17 fara tey, sum hava hug til tað, til jólagudstænastu hjá Frelsunarherinum, og umleið klokkan 18.30 er jóladøgurðin við dunnu, rís a la mande og øllum tí, sum fólk flest eta jólaaftan.

Aftaná verða jólagávurnar býttar út.

### Rúm fyri øllum

Enn veit Elisabeth Joensen ikki, hvussu nógv tey verða í herberginum jólaaftan. Har búgva beint nú 10 menn fast, men tað kann verða, at onkur fer til skyldfólk at halda jól. Teir, sum javnan koma inn á gólvið um dagin, eru eisini bodnir, men teir mugu tekna seg, so tey vita, hvussu nógv fólk matur skal gerast til.

- Tað ger einki, um onkur kemur, sum ikki hevur teknað seg, tí eingin má ganga kaldur og svangur á jólum. Vit koyra ongan útaftur, sigur Elisabeth.

Í herberginum verður jólaaftan ein á vakt um kvøldið og ein um náttina. Haraftrat hava eini hjún boðið sær til at taka sær av jólahaldinum í herberginum.

## Gjørdi seg inn á eldri mann

**Ein yngri fullur maður varð handtikin umborð á Norrønu leygardagin í Hirtshals, eftir at hann hevði tikið ein rolator frá einum eldri manni**

Randi Jacobsen

Fráferðin hjá Norrønu leygardagin úr Hirtshals var nógv seinkað av eini hending umborð.

Ein yngri fullur gekk var umborð, og hein gekk og gjørdi ónáðir.

Fleiri ferðafólk klagaðu um mannin, og starvsfólkini royndu at sissa hann.

Maðurin hevði millum annað tikið rolatorinum frá einum eldri manni.

Tá ið starvsfólkini fóru eftir manninum, bleiv hann harðligur, og tá var ikki annað at gera enn at ringja eftir politinum, sum fór avstað við manninum.

- Vit eru sera hørm um, at ferðafólkini skuldu uppliva slíkt, og at fráferðin var seinkað. Kanska var tað eitt mistak, at maðurin slapp umborð, men hann kann hava havt okkurt drekkandi við sær umborð, sigur Rúni Vang Poulsen, stjóri á Smyril Line.

Maðurin slapp at sova í arresthúsinum og varð latin leysur aftur sunnumorgunin.

Politiið sigur, at maðurin kann vænta sær umleið 1000 krónur í bót.

Sum skilst var maðurin føroyingur, men búsitandi í Danmark.